Keypssamtøkan í Dr. Jakobsensgøtu

FK í Dr. Jakobsensgøtu sóknast eftir

**Hjálparfólki til breyðsøludeildina**

at byrja skjótast til ber



Vit sóknast eftir einum røskum fólki, við góðum røkiskapi og áræði, til fast starv í einum handli, sum lív altíð er í.

**Arbeiðsuppgávur:**

At røkja starvið sum hjálparfólk í breyðsøludeild okkara.

**Arbeiðstíð:**

Um 25-30 tímar um vikuna, (3/4 tíð), harav annan hvønn leygardag fyrrapart

Vit rokna við, at tú ert:

- Røkin, álítandi og fleksibul
- Blíðlíg/ur av lyndi
- Trívist væl við nógvum og fjølbroyttum uppgávum

**Løn:**

Smbrt. S & K sáttmálanum

Send okkum nøkur orð um teg sjálva/n til:

Keypssamtøkan
í Dr. Jakobsensgøtu
Postmoga 349
FO-110 Tórshavn
Tel 31 13 20

Att.: Bo M. Hansen, tel 217593
ella Áki Jespersen, tel 210648

# Líta aftur í framtíðina

**Landsverk fyllir 60 ár í dag, og har hava tey valt at markera dagin við einari bókaútgávu, ið lýsir søguna hjá stovninum og føroyska samfelagnum, men sum í minst líka stóran mun lítir frameftir**

BÓKAÚTGÁVA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Oyvindur Brimnes, stjóri á Landsverk, handar Bjørt Samuelsen, landsstýriskvinnu í vinnumálum, fyrsta eintaki av »Mynstur broytast«*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Á lítlari samkomu í morgun handaði Oyvindur Brimnes, stjóri á Landsverk, fyrsta eintakið av bókini »Mynstur broytast – Landsverk bygt land í 60 ár« til landsstýriskvinnuna í vinnumálum, Bjørt Samuelsen.

Landsverk er ein stovnur, sum seinastu árini hevur broytt seg munandi frá at vera ein tungur, konservativur stovnur til tann modernaða og dynamiska stovn, hann er í dag.

Tað sló Bjørt Samuelsen fast í stuttari røðu við handanina.

- Eg gjørdist ikki sørt ovfarin, tá eg vitjaði á stovninum fyri nøkrum mánaðum síðani og gjørdist varug við, at Landsverk í veruleikanum ikki er tann tungi, konservativi stovnurin, ið eg helt, og sum bara hugsar um asfalt og betong, segði Bjørt Samuelsen.

Eisini Oyvindur Brimnes legði dent á, at Landsverk í dag ikki bara hugsar um tunlar og brýr, men í minst líka stóran mun hugsar um umhvørvið og um, hvussu hetta hóskar inn í landslagið.

Høvundar til bókina hava verið Firouz Gaini og Helgi Jacobsen. Teir hava býtt arbeiðið upp sínámillum soleiðis, at Helgi Jacobsen hevur tikið sær meiri av tí søguliga partinum, meðan Firouz Gaini hevur hugt meiri at framtíðini.

- Stovnurin er nógv broyttur tey seinastu árini. Hann er vorðin meiri modernaður og meiri strategiskur, og Landsverk var hin fyrsti – í hvussu er almenni – stovnurin, ið byrjaði at arbeiða á henda hátt, segði Oyvindur Brimnes.

Tað er Súsanna McBirnie, ið hevur staðið fyri samskipanini av bókini, meðan Sendistovan hevur havt umbróting og design um hendi.



1991 2008

**Fríggjadagin 6. juni og leygardagin 7. juni heldur O.K.Heilsøla & Maskinur 17 ára føðingardag**

**Í hesum sambandi er handilin opin frá kl. 8.00 til kl. 22.00 fríggjadagin og frá kl. 9.00 til kl. 17.00 leygardagin.**

**Latið verður**

**upp til 75 %**

**í avsláttri av ávísum vørum.**

**Leygardagin verður kaffi v.m.**
**Okkurt verður eisini til børnini.**

sp/f O.K. HEILSØLA & MASKINUR

430 HVALVÍK · TEL 42 23 94